UTTAN ÚR HEIMI

Byggimeistari skal takast

Mundugleikarnir í Turkalandi leita nú eftir byggimeistaranum, sum stóð fyri arbeiðinum at byggja skúlan, sum rapaði í jarðskjálvtanum seinasta hósdag. 84 børn og ein lærari, sum vóru í skúlanum, doyðu.

Ríkisákærin í Ankara, Ali Erbay, heldur, at byggimeistarin er sekur, og kemur rætturin til somu niðurstøðu, kann maðurin fáa upp í fýra ára fongsul.

Vanlukkan hevur elvt til nógv orðaskifti í Turkalandi. Víst verður á, at umfatandi korrupsjón og líkasæla hava gjørt, at nógvir almennir bygningar eru als bygdir eftir umstøðunum í jarðskjálvtaøkjum. Tað hevur millum annað víst seg, at byggimeistarar, sum hava bygt fyri tað almenna, hava nýtt ov vánaligt tilfar, uttan at tað almenna byggieftirlitið hevur lagt uppí.

Kirchner á odda

Nógv bendi á, at tann lutfalsliga ókendi guvernørurin Nestor Kirchner fer at vinna forsetavalið í Argentina tann 18. mai.

Tann seinasta veljarakanningin sigur, at Kirchner fer at fáa 65,3 prosent av atkvøðunum, meðan hitt valevnið, fyrrverandi forsetin Carlos menem, bert fær 26,1 prosent. Í fyrra valumfarinum fekk Menem 24 prosent og Kirchner 22.

Men nógvir argentinar vilja ikki hava Carlos Menem aftur í forsetaembætið. Tey vilja vera við, at hann var upphavsmaðurin til tær nógvu fíggjargølurnar, sum skakaðu Argentina í árunum frá 1989 til 1999, og at hann tískil eisini hevur skyldina av teirri sera vánaligu búskaparstøðuni í landinum. Kreppan hevur havt við sær, at arbeiðsloysið er um 25 prosent, samstundis sum umleið 60 prosent av fólkinum liva á ella undir fátækramarkinum.

Bush revsar grannarnar

Mánadagurin var halgidagur í Meksiko, og sum siður er, helt amerikanski forsetin, George W. Bush, røðu hendan dagin til heiðurs fyri teir nógvu meksikanararnar, sum búgva í USA.

Men eygleiðarar løgdu til merkis, at Bush nevndi ikki meksikanska forsetan, Vincent Fox, í røðuni. Tað hevur hann gjørt hini árini, og eygleiðararnir ivast ikki í, at broytingin hesaferð komst av, at Meksiko var ímóti amerikanska álopinum á Irak.

Upprunaliga skuldi Bush verið í hinum grannalandinum, Kanada, á almennari vitjan, men ferðin varð avlýst. Kanada var eisini ímóti krígnum í Irak, og heldur ikki kanadiumenn sluppu undan einari viðmerking frá Bush. Sama dag, sum hann skuldi verið farin til Kanada, rósti hann avstralska forsætisráðharranum, John Howard, tí hesin hevði tikið undir við krígnum í Irak og sent avstralskar hermenn til Persaflógvan.

Tók eina milliard við sær

Amerikanska blaðið New York Times vil vera við, at sonur Saddam Hussein, Qusay, tók eina milliard dollarar úr iraksku tjóðbankanum nakrar fáar tímar undan tí fyrsta amerikanska rakettálopinum á Bagdad. Sambært blaðnum var talan um 900 milliónir dollarar og 100 milliónir evrur.

Keldurnar hjá New York Times hava greitt blaðnum frá, at Qusay fekk ein av næstu ráðgevunum hjá faðiri sínum at skriva eina formliga áheitan á tjóðbankan um at útflýggja pengarnar. Alt varð útgoldið í seðlum, men teir fyltu so nógv, at tjóðbankin noyddist at pakka pengarnar í tvær bingjur.

Eingin veit, hvar pengarnir eru, men summar keldur vilja vera við, at nakrar bingjur vórðu fluttar úr Irak til Sýrialands. Um tær báðar bingjurnar við pengunum úr tjóðbankanum vóru millum teirra, er tó ikki greitt.

Walter Sisulu deyður

Vinmenninir og stríðsfelagarnir Walter Sisulu og Nelson Mandela

Kendi suðurafrikanski mannarættindastríðsmaðurin Walter Sisulu er deyður, 90 ára gamal.

SUÐURAFRIKA
Árni Joensen

Walter Sisulu, ið saman við Nelson Mandela stóð á odda í stríðnum ímóti apartheidstýrinum í Suðurafrika, doyði mánadagin.

- Í 62 ár vóru lív okkara tvinnað saman. Vit hava býtt gleðina og pínuna av tí at liva. Vit høvdu felags sjónarmið og átóku okkum ábyrgd. Vit gingu lið um lið ígjognum deyðans dal, røktu sárini hjá hvør øðrum og styðjaðu hvør annan, tá beinini ikki orkaðu meiri. Tað er tómligt, nú hann er farin. Ein partur av mær er burturi, segði Mandela í einari kunngerð, stutt eftir at deyðsboðini av gamla vinmanninum og stríðsfelaganum vóru komin.

Walter Sisulu var føddur í 1912 ella sama árið, sum suðurafrikanska frælsisrørslan ANC varð stovnað. Longu sum smádrongur fekk hann at kenna sviðan av fátækradømi og rasuskilnaði. Saman við Nelson Mandela og Oliver Tambo, sum doyði í 1993, stóð Walter Sisulu á odda fyri ungdómsdeildini hjá frælsisrørsluni, og í 1949 varð hann valdur til aðalskrivara í ANC.

Í 1963 vórðu hann og fleiri aðrir svartir leiðarar dømdir lívlanga fongsulsrevsing fyri landasvik, og tey næstu 26 árini sat hann í ymsum fangalegum, tó meginpartin av tíðini á Robben Island saman við Nelson Mandela.

Tá Walter Sisulu varð latin leysur í 1989, var tað eitt tekin um, at dagarnir hjá apartheid-stýrinum vóru taldir. Nakrar mánaðir seinni varð Nelson Mandela eisini latin leysur, og Sisulu var tann fyrsti, sum møtti Mandela, tá hann kom út um fongsulsdyrnar.

Allir gíslarnir avrættaðir

Vinstrasinnaðir uppreistrarmenn í Kolombia hava avrættað tíggju gíslar, teirra millum ein fyrrverandi verjumálaráðharra.

KOLOMBIA
Árni Joensen

Fyrrverandi kolombiski verjumálaráðharrin, Gilberti Eccheverri, er funnin avrættaður

Síðani tann 21. apríl hava stjórnarhermenn í Kolombia leitað eftir tíggju monnum, sum vórðu burturfluttir undir einari skrúðgongu. Nú eru líkini av teimum tíggju funnin.

Kolombiska stjórnin váttaði í gjár, at hermenninir høvdu funnið líkini av Gilberto Echeverri, fyrrverandi verjumálaráðharra, Guillermo Gaviria, guvernøri og átta hermonnum.

Sambært stjórnini hava uppreistrarmenninir framvegis umleið 80 fólk sitandi gíslar. Teirra millum eru ein tinglimur, eitt forsetavalevni, ein guvernørur, fleiri løgreglumenn og tríggir amerikanskir ríkisborgarar. Teir tríggir amerikanararnir vóru í einum flogfari, sum uppreistrarmenninir skutu niður.

Uppreistrarrørslan hevur kravt at fáa nakrar fangar leysar í býti við gíslarnar, men hesum hevur Alvaro Uribe, forseti víst aftur.

Frá Runavíkar Skúlastýri

Lýsing eftir lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004.

Talan er um
- 5 størv á 26,5 lønartíma fyri lærarar í farloyvi
- 1 starv á 26,5 lønartímar vegna lækka tímatal og avlopstímar.

Serliga er brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í handverk og list, ítrótti, teld, alis/evnafrøði og serligan tørv.

Størvnini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1. og 27.4.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 447331 ella 217331.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 23. mai.

Runavíkar Skúlastýri
v/ Malan Rasmussen
Bakkavegur
FO-645 Søldarfjørður

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Ferjurampan í Vestmanna til sølu

Við hesum verður ferjurampan inni á Fjørð í Vestmanna lýst til sølu.

Boð skulu latast Landsverkfrøðinginum í seinasta lagi 16.05.2003.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, deildarleiðara, á tlf. 311333 ella teldupost ewald@lv.fo

Landsverkfrøðingurin

Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004 fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal o.a.; 3 fulltíðarstørv og 1 parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424360, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2003.

Vestmanna Skúlastýri
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

Götu Skúli

søkir eftir lærarum

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara. Setanin er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004.

Vegna uml. 20 avlopstímar verður søkt eftir lærara. Setanin er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinsta lagi 21. mai 2003.

Um nærri upplýsingar ber til at venda sær til fyrstalæraran á tlf. 441069 ella formannin í skúlastýrinum tlf. 44 16 14.

Götu Skúlastýri
v/Mariu Gregersen
510 Gøtu

Tofta skúli

Vegna farloyvir, avlopstímar og stuðulstímar til næmingar við serligum tørvi, verður søkt eftir 4 lærarum í Tofta Skúla. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004.

3 av størvunum eru til fulla tímatalvu, 26,5 tímar um vikuna, meðan 1 starv er til 24,0 tímar um vikuna.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. mai 2003.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við skúlaleiðaran, telf. 447332.

Skúlafyri fyri Tofta skúla
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir.

Reingerðarfólk

Til framsýningarnar hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni 6 og í Hoyvíksgarði verður søkt eftir álítandi reingerðarfólki/fólkum fyri summarið 2003 at byrja 19. mai 2003.

Framsýningarnar eru opnar hvønn dag fram til sunnudagin 14. september 2003.
Arbeiðstíðin er 22 tímar um vikuna.

Skrivlig umsókn skal vera Fornminnissavninum í hendi í seinasta lagi 14. mai.

Føroya Fornminnissavn
Postboks 1155
110 Tórshavn
tlf. 310700

FÍGGJARMÁLASTYRIÐ
Føroya Gjaldstova
Traðagøta 39, Postboks 2009, FO-165 Argir, Færøerne

Starv sum avloysari

Starv sum avloysari er leyst at søkja á lønarbókhaldinum á gjaldstovuni í tíðarskeiðinum 1. juli ella sum skjótast - fyribils til 29. februar 2004.

Uppgávurnar fevna m.a. um :
- Lønarskráseting/-málsviðgerð
- Lønarkoyring
- Skráseting og rætting
- At stemma av lønarkoyringar
- Aðrar uppgávur t.d. svara lønarfyrispurningum og arkivering

Persónlig krøv til umsøkjaran :
Tann, ið settur verður, skal vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

Krøv til útbúgving og royndir :
Viðkomandi, sum verður settur, skal helst hava nøktandi royndir innan almenna lønarumsiting. Um viðkomandi ikki hevur slíkar royndir, so skal tann, ið verður settur, hava útbúgving innan roknskap e.t.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í III flokki

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðny Simonsen, deildarleiðara, tlf. 352410

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu verða send til :

Føroya Gjaldstovu
Traðagøtu 39
Boks 2009
165 Argir

Umsóknarfreist : 22. mai 2003 kl. 12